## Runavíkar kommuna søkir eftir

# Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 1 pedagogi 35t. um vikuna ið skal arbeiða á einari stovu við 18 seks ára gomlum børnum.

Setan verður frá 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2005, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

## 10 EL-bilar og 2 Hoppiborgir í sera góðum standi til sølu, helst samlað



**Tlf 21 98 28**

# Pedagogar

## til Dagstovnin Mýrifípan og útibarnagarðin í Trongisvági.

**Stovnslýsing:**
Á Mýrifípuni ganga 90 børn í aldrinum 0-7 ár. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, ein vøggustova, tríggjar barnagarðsstovur, harav ein hálvdagsstova, ein heildagsstova og ein útibarnagarðsstova.

**Størvini:**
- 1 starv 30 tímar um vikuna í útibarnagarðinum. Starvið verður sett 15. august 2005 Útibarnagarðurin heldur til í hølum fyri seg, undir skúlanum í Trongisvági. Hann er normeraður til 20 børn í aldrinum 5-7 ár og 4 starvsfólk.
- 1 avloysarastarv 35 tímar á vøggustovuni fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi. Starvið verður sett 1. oktober 2005 ella eftir nærri avtalu. Vøggustovan er normerað til 12 børn í aldrinum 0-3 ár og 4 starvsfólk.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi
- at tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tær dámar væl at vera úti í náttúruni, sum er ein nattúrligur partur av dagligdegnum
- at tú hevur yvirlit í arbeiðinum
- at tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú ert nærverandi og vísir umsorgan
- at tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðnum

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki fáast til størvini, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.
Meiri fæst at vita, við at venda sær til Birita Jacobsen, leiðara á telefon 37 27 00.

**Umsókn,** saman við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum, skulu vera Dagstovninum Mýrufípuni, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagið 15. juli 2005.

**Tvøroyrar kommuna**

## 1-ÅRIGT BASISKURSUS I MISBRUGSBEHANDLING

*Gjáargarður, Gjógv - Start august 2005*
***Endnu 4 ledige pladser***

*For information kontakt:*
*Martin Kúrberg, Eiði 423529*
*Jesper Grubach, Danmark 0045-74585111*

**Institut for Misbrugsbehandling og Pskykoterapi, Danmark**
**www.misbrugsdannelsen.dk**

Sosialurin 341800

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður sjúkrakassin stongdur 11. juli. Opið er aftur mánadagin 15. august.

**Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið millum Gilja**

Býlingshúsið hevur tríggjar stovur, har eru tilsamans 52 børn og 11 starvsfólk.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Reingerðarfólk

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið millum Gilja eftir:**
- einum reingerðarfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jónu Guttesen, stovnsleiðara, tlf 318372/272545.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. juli 2005.

## Á FLOG UTTANLANDS

**LÆTTARI KANN TAÐ IKKI GERAST**



**FÁ BILIN UMVÆLDAN MEÐAN TÚ ER ÚTI OG FERÐAST**

Vit umvæla bilin meðan tú er uttanlands.
Eftir ynski, heinta vit bilin á flogvøllinum, og hava hann kláran tá tú kemur heimaftur.

Ring í rímuligari tíð á tel 33 28 52 ella 28 38 32, og vit avtala nærri.

**MYLLAN**
Bilverkstaður · 370 Miðvágur

# Tvøroyrar skúli

Søkt verður eftir stuðulsfólki skúlaárið 2005/2006.

Starvið er 23 tímar um vikuna.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Eidesgaard, skúlastjóra, tlf. 371582.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 16. juli 2005.

**Skúlastýrið á Tvøroyri**
v/ Chris Jan Michelsen
FO-800 Tvøroyri